Vánaligu úrslitini í oljuleiting:

# Nýtast ikki at vera vansi ella afturstig

**-Úrslitini koma at seinka boringunum av komandi leitibrunnum á føroyska landgrunninum. Hetta nýtist tó ikki sum frálíður at verða ein vansi ella afturstig fyri føroyska oljuleiting. Tað er ikki altíð avgerandi, nær brunnarnir verða borðaðir, men heldur at teir eru væl fyrireikaðir og boraðir í tey leitimiðini, ið hildin verða at geva størst møguleika fyri at finna olju ella gass segði Eyðun Elttør m.a. í tá hann í farnu viku legði frágreiðing um oljumál fram**

## 20 mill. kr. inn í oljuskatti

Skattainntøkurnar til føroyska landskassan í 2001 frá útlendingum, sum starvaðust í frálandavinnuni, og frá víddargjøldum, sum loyvishavararnir gjalda fyri leitiøkini, var umleið 20 milliónir krónur. Umframt hetta kemur skattur frá útlendskum veitarafeløgum, sum ikki er uppgjørdur enn, og skattur frá føroyskum feløgum og persónum. Fyri føroyingar og føroyskar fyritøkur verður oljuvirksemið ikki uppgjørt fyri seg, og tí er torført við vissu at siga nakað um úrtøkuna fyri landskassan vísti Eyðun Elttør á á tingi í farnu viku.

Fíggjarmálastýrið hevur vegna samgonguna arbeitt við einum uppskoti um ein búskapar- ella oljugrunn, sum tað tíverri ikki eydnaðist at fáa lagt fram í hesi tingsetuni. Í hesum arbeiði havi eg lagt dent á, at framleiðslugjaldið, ið er heimilað í oljuloyvunum, skal beinleiðis í landskassan, tí endamálið við framleiðslugjaldinum var at útvega landskassanum inntøkur frá kolvetnisframleiðsluni, so skjótt hon byrjaði.

## Skilagóð førleikamenning

Í leitiloyvunum er ásett, at oljufeløgini skulu brúka tilsamans umleið 85 milliónir yvir 6 ár til førleikamenning. Til tess at tryggja, at peningurin kemur so væl til sættis sum møguligt, varð gjørt av, at loyvishavararnir saman við vinnulívinum og útbúgvingarverkinum skuldu finna verkætlanir, sum eru førleikamennandi. Oljumálastýrið skal, áðrenn farið verður undir slíkar verkætlanir, góðkenna at stuðul verður latin av upphæddini, ið er markað til førleikamenning segði Eyðun Elttør og vísti á, at tað hevur verið fílst á, at vit ikki settu krav um, at peningurin til førleikamenning varð settur í ein grunn, sum føroyskir myndugleikar høvdu ræði á, heldur enn at lata oljufeløgini sjálvi verða við til at gera av, hvat peningurin verður nýttur til.

Í sambandi við loyvisveitingina, var tankin um, at oljufeløgini skuldu seta peningin til førleikamenning í ein grunn, havdur á lofti. Tankin var kortini skjótt sleptur aftur. Hildið varð, at oljufeløg, ið fara undir leiting á føroyskum øki, ikki eiga at sleppa undan at taka lut í føroyska samfelagslívinum, og í hesum sambandi eisini vera við til at eyðmerkja ætlanir, sum tey halda tað vera skilagott at stuðla. Somuleiðis varð mett, at fyri føroyska vinnu kann sjálvt samskiftið við altjóða oljuídnaðin vera mennandi. – Lat meg so leggja afturat, at verður øll upphæddin til førleikamenning ikki brúkt í 6-ára leitiskeiðnum, kann restupphæddin verða latin í grunn. Annaðhvørt ein grunn, ið verður stovnaður til endamálið, men skilabetri er helst at lata upphæddina í onkran verandi grunn, t.d. granskingargrunnin vísti Eyðun Elttør á í tinginum í farnu viku.

FRÁGREIÐING UM OLJUMÁL

*Jan Müller*

Í farnu viku legði Eyðun Elttør, landsstýrismaður drúgva frágreiðing fyri tingið um oljumál. Hetta er í tráð við at tað í § 44 í kolvetnislógini er ásett, at "….landsstýrið skal í minsta lagi annað hvørt ár leggja fram fyri tingið frágreiðing, sum skal verða grundarlag fyri einum oljupolitiskum orðaskifti…." Í tingsetuni 1999/2000 varð lógaruppskotið um fyrsta útbjóðingarumfar lagt fram, og varð tá gjørt vart við, at drúgvu viðmerkingarnar komu ístaðin fyri eina sjálvstøðuga frágreiðing um oljumál.

Í hesi fyrstu veruligu § 44-frágreiðingini er dentur lagdur á at geva eina breiða lýsing av føroyskari oljuvinnu, soleiðis at flestøll evni av týdningi eru tikin við.

Í framløgurøðu síni vísti landsstýrismaðurin á, at fremsta málið við oljuleiting er at staðfesta, um olja og gass í rakstrarverdum nøgdum eru at finna í okkara undirgrund. Er talan um slíkar nøgdir, er fyrsta og fremsta uppgávan at syrgja fyri, at hesi kolvetni verða troytt á mest skynsama hátt.

- Eg nevni hetta lutvíst tí tað er hetta málið, sum fær flestu tjóðir við møguleika fyri oljuframleiðslu at leggja dent á leitiskyldurnar hjá oljufeløgum heldur enn t.d. loyvisgjald, tá loyvini verða veitt, og lutvíst tí tað í samfelagskjakinum tíðum verður lagdur ov stórur dentur á viðurskifti, sum fylgja við ella eru avleiðing av oljuleitingini. Vit eiga alla tíðina at minnast til, at málini við føroyskari oljuvinnu bara kunnu náast í fullan mun, um oljuframleiðsla einaferð gerst veruleiki.

Eftir at leiti- og framleiðsluloyvini vórðu veitt í august 2000, hava myndugleikar, eisini aðrir enn oljumálastýrið, og oljufeløg arbeitt miðvíst fram ímóti at fyrireika leitiboringarnar, sum vóru gjørdar á føroyska landgrunninum seinasta summar.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum: - Um úrslitið av oljufundinum í summar ikki vísir seg at goyma rakstrarverdar nøgdir, fer tað at ávirka vónirnar til at finna olju í djúpari fláunum aðrastaðni á landgrunninum. Avbjóðing hjá oljumyndugleikunum verður tá at tryggja ein framhaldandi áhuga fyri føroyska økinum*

Arbeiðsskyldurnar, sum eru ásettar í loyvunum, fevna um 8 leitiboringar, seismiskar o.a. kanningar á einstøku loyvisøkjunum, umframt aðrar meira vísindaligar kanningar á landgrunninum sum heild. Skyldurnar við leitiboringum eiga at vera nóg mikið til at staðfesta um kolvetni finnast á loyvisøkjunum.

Eyðun Elttør vísti í røðu síni eisini á úrslitini frá oljuboringunum í fjør. -Um vit hyggja nærri eftir úrslitinum av boringunum í summar, mugu vit ásanna, at tað ikki gekst heilt sum væntað. Økini, sum frammanundan vóru mett at verða tey mest spennandi, vístu seg bert at innihalda smáar nøgdir av kolvetni. Hinvegin vóru munandi nøgdir av olju funnar í djúpari jarðarløgum, har vánirnar frammanundan ikki vóru mettar serliga góðar. Eg haldi, at fyri føroyska økið sum heild er umráðandi, at vit hava staðfest eina virkna kolvetnisskipan. Tá tað er sagt, so krevur oljufundurin hjá Faroes Partnership við Amerada Hess á odda, at bæði oljumyndugleikar og oljufeløg mugu endurskoða jarðfrøðiligu myndlarnar, ið lógu til grund fyri fyrstu leitiætlanunum.

Landsstýrismaðurin helt tí, at vit í fyrstu atløgu mugu vit rokna við, at úrslitini koma at seinka boringunum av komandi leitibrunnum á føroyska landgrunninum. Hetta nýtist tó ikki sum frálíður at verða ein vansi ella afturstig fyri føroyska oljuleiting. Havandi endamálið við oljuleitingini – tað at finna olju og gass – í huga, er tað ikki altíð avgerandi, nær brunnarnir verða borðaðir, men heldur at teir eru væl fyrireikaðir og boraðir í tey leitimiðini, ið hildin verða at geva størst møguleika fyri at finna olju ella gass.

Ásetingarnar í loyvunum um ymiskar vísindarligar kanningar kunnu hava stóran týdning fyri framtíðar oljuleiting á føroyska landgrunninum. Við loyvunum sum grundarlag hevur Jarðfrøðisavnið saman við loyvishavarunum tikið stig til eitt samtak – nevnt Sindri – har umleið 40 milliónir kr. skulu nýtast til ymsar jarðfrøðiligar og kanningartøkniligar verkætlanir komandi 5 – 6 árini. Dentur verður serliga lagdur á verkætlanir, ið kunnu bøta um útlitini fyri oljuleiting á basaltøkjum.

Sum skilst verður virksemið á føroyska landgrunninum í nærmastu framtíð neyvan eins víðfevnt og føroyska vinnan hevði væntað. Hetta kann sjálvandi vera óheppið, men hinvegin skilja flestu fyritøkurnar, at luttøka í oljuvirksemi tekur tíð, og skal roknast sum ein íløga í framtíðina heldur enn løtuvinningur. Eg kann bara vóna, at tær fyritøkur, sum longu hava veitt vørur og tænastur til oljuvinnuna, søkja og fáa uppgávur aðrastaðni, t.d. á bretska landgrunninum. Á tann hátt kunnu tær fáa royndir, sum koma teimum til góðar, tá størri virksemið tekur seg upp aftur á føroyska landgrunninum.

### Annað loyvisumfar

Landsstýrismaðurin nam síðani við eitt møguligt annað loyvisumfar. -Fyri at halda eitt støðugt leitivirksemi, er vanligt aðrastaðni at hava nýggj útbjóðingarumfør við jøvnum millumbilum, t.d annað ella fjórða

*Framhald á síðu 35*




**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður 13. mars 2002 kl. 19$^{30}$.

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9.

**Dagsskrá:**

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing frá stjórnini fyri farna árið
3. Framløga av grannskoðaðum roknskap
4. Val av skattmeistara
5. Val av einum stjórnarlimi
6. Val av tveimum tiltakslimum til stjórnina
7. Áseting av limagjaldi
8. Uppskot frá nevndini um lógarbroytingar
9. Ymiskt

**Nevndin**





Atlas Copco

STEMPIL OG SKRÚVU KOMPRESSARIR

Stationerir og transportablir størri samt smærri

Fáast í flestum støddum til øll endamál verkstøð. fiskavirkir, alibrúk, entreprenørar v.m.

Kaj Andreasen & Co

Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008



**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður 13. mars 2002 kl. 19$^{30}$.

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9.

**Dagsskrá:**

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing frá stjórnini fyri farna árið
3. Framløga av grannskoðaðum roknskap
4. Val av skattmeistara
5. Val av einum stjórnarlimi
6. Val av tveimum tiltakslimum til stjórnina
7. Áseting av limagjaldi
8. Uppskot frá nevndini um lógarbroytingar
9. Ymiskt

**Nevndin**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1018, P/F Skemman, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Steiner Hansen, 650 Toftir.
Innkomnir sum stjórar: Dan Hansen, Suðurrás 7, 100 Tórshavn og Signar Johannesen, Torkilsgøta 19, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 8. mars 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3291, P/F D.J.W., 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 25.02.2002.
Adressa: 370 Miðvágur
Nýggjur heimstaður: Miðvágs Kommuna

Skráseting Føroya tann 8. mars 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1423, Sp/f Norðoya Fruktsøla-Nor Fodd, 700 Klaksvík.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Korinta Lindberg, Garðavegur 13, 700 Klaksvík
Innkomin í nevndina: Maria Lindberg, Víkavegur 133, 700 Klaksvík.

Skráseting Føroya tann 8. mars 2002

Kristin Balle

---





SKIPASMIÐJAN




P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Tel: 31 11 55 · Fax: 31 11 25

P/F Skipasmiðjan á Skála
Tel: 44 11 55 · Fax: 44 11 25

24 tíma Vakt
tlf: 21 11 55

www.faroeyard.fo · E-mail: sale@faroeyard.fo



# Fótbóltur 2002

## - serútgáva í litum frá Sosialinum

Aftur í ár gera vit eitt fótbóltsblað, har vit royna at leiða lesaran eitt sindur meira afturum leiktjøldini enn vanligt. Tosað verður við leikarar, venjarar og leiðarar, sum hvør í sínum lagi hava givið til kennar sínar hugsanir og ynski.

Fyritøkur og onnur, ið ynskja at lýsa í hesari serútgávu, eru vælkomin at venda sær til okkara fyri at fáa nærri upplýsingar.

Deadline fyri at fáa lýsingar inn er 20. mars.

Ringið til Sosialin 311820, og tosið við:
Anju Weihe
Marknaðardeildin
anja@sosialurin.fo